


# Selja Føroyar á altjóða oljuframsýning í London

Deil:

Jan Müller

20.11.2014 - 10:42

Oljan.fo

Í hesum døgum verður altjóða oljuframsýningin og ráðstevnan “PETEX” hildin í London við luttøku av 150 framsýnarum úr nógvum londum kring heimin, teirra millum eisini Føroyum. Trý fólk frá Jarðfeingi, Heri Ziska, Óluva Eidesgaard og Malan Ellefsen, standa fyri føroyska básinum, ið hevur sum grannar lond sum Indonesia, Írland, Nýfundland og Nova Scotia, Isle of Man, Marocco, Tunis og Mosambique. Hetta eru lond og landspartar, sum royna at skapa áhuga fyri oljuleiting í teirra økjum, ein kapping, sum gerst støðugt harðari við einum lækkandi oljuprísi.

PETEX, sum stendur fyri “Petroleum Exploration Technology Exhibition”, verður hildin annaðhvørt ár og er talan um eina tøkniliga framsýning, har varpað verður ljós á undirgrundina í ymsum leitiøkjum kring heimin.

Umleið 60 framløgur verða á PETEX, og millum mongu fyrilestrarhaldararnar er eisini kendi bretski vinnulívsmaðurin, Sir Ian Wood, sum herfyri legði fram eina sera áhugaverda og nógv umrødda frágreiðing um støðuna hjá bretsku oljuvinnuni, har hann mælti til størri samstarv millum ymsu oljufeløgini og oljuídnaðin og myndugleikarnar.

Nú eingir nýggir brunnar eru í føroysku ordrabókini og nú flestu av loyvunum ganga út í næstum, er avgerandi neyðugt hjá føroyskum myndugleikum at eggja oljufeløgum til at koma hendavegin at leita eftir olju og gassi. Hetta er tó eingin løtt uppgáva og sjálvfylgja, tí kappingin millum nógv ymisk øki kring heimin um íløgurnar er sera hørð.

Í hesi kapping eru mong kappingarparametur, sum kunnu gera av, hvørji øki oljufeløgini fara at velja. Tað er fyrst og fremst prospektiviteturin tvs. møguleikarnir fyri at finna olju og gass, síðani er tað lóggávan og loksins og ikki minst váðin í sambandi við dýpi, grótslag (basalt), veðurlag og síðani sannlíkindini fyri at raka við.

Í Føroyum eru bert boraðir 9 brunnar, og tað er lítið fyri eitt so stórt øki, tó at nógvar kanningar eru gjørdar her. Millum føroyingarnar á PETEX er eisini Malan Ellefsen, jarðfrøðingur, sum herfyri varð sett í starv til m.a. at marknaðarføra føroyska landgrunnin.





